# Sumbingar fingu pengarnar aftur

**– Vit eru ógvuliga varin so at vit ikki misbrúka støðu okkara, sigur stjórin á Gjaldstovuni**

KOMMUNUSKATTUR
*Áki Bertholdsen*



*Sumba hava nú fingið pengarnar aftur, sum Gjaldstovan afturhelt ímóti teirra vilja*

Nú hevur Sumbiar Kommuna fingið peningin aftur, sum Gjaldsstovan hevði afturhildið í kommunuskattinum.

Talan var um eina upphædd upp á nakrar hundrað túsund krónur, sum gjaldstovan hevði afturhildið í kommunuskattinum hjá Sumbiar Kommunu eftir áheitan frá Landsverkfrøðinginum.

Landsverkfrøðingurin hevur asfalterað í Sumba, men kommuna vildi ikki góðtaka rokningina.

Men Landsverkfrøðingurin gevur síðani Gjaldstovuni boð um at afturhalda pengunum, áðrenn kommunan fær skattin útgoldnan.

Og tað ger Gjaldsstovan og hevur longu afturhildið einum parti av rokningini, 200.000 krónur, eftir, hvat vit hava fingið upplýst.

Bygdaráðið í Sumba varð so misnøgt við, at Gjaldstovan heldur pengum hjá kommununi aftur, uttan at kommunan hevur givið tilsøgn um tað, at hon bað sakførarar kanna málið.

## Skal ikki vera nakar ivi

Men tá ið kommunan so ger vart við, at hon góðtekur ikki rokningina, fer Gjaldsstovan undir arbeiðið at gjalda tær aftur.

– Men tað fara ótrúliga nógvar flytingar fram ígjøgnum Gjaldsstovuna og tað verða milliardir fluttar ímillum landið og kommunurnar. Samstundis kom ferian, so tað dróg út at fáa alt í rættlag aftur, sigur Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldsstovuni.

Hann sigur, at peningurin varð bókaður Sumbiar Kommunu í farnu viku og verður fluttur kommununi nú.

Hann sigur, at tað er tann heilt greiði politikkurin hjá Gjaldsstovuni, at støða hennara má ikki verða misbrúkt, tvs, at tað má ikki verða misbrúkt, at hon er so nær skattakrónunum hjá kommununum.

– Tað vil siga, at er ivi um eitt krav, verður rokningin ikki afturhildin í kommunuskattinum. Fáa vit boð frá einum almennum stovni um at afturhalda eina upphædd í skattinum hjá eini kommunu, gera vit tað ikki, um kommunan ikki er samd í, at rokningin skal gjaldast, sigur Leif Abrahamsen.

Hann sigur kortini, at tað hevur verið siðvenja í nógv ár, at almennir stovnar biðja Gjaldsstovuna afturhalda kommunuskatt fyri rokningar og gjøld av ymsum slag, sum kommunurnar ikki hava goldið Og tað hevur Gjaldsstovan gjørt. Men er ivi um antin kommunan eigur at gjalda rokningina, verður tað ikki afturhildið, tí í slíkum førum mugu partarnir fara vanliga vegin fyri at fáa málið avgreitt, tvs, at teir mugu fara í rættin.

Í hesum føri fingu vit boð frá Landsverkfrøðinginum um at halda peningin aftur, men tá ið kommunan ger vart við, at hon góðtekur ikki kravið, verður peningurin afturgoldin.

Leif Abrahamsen sigur, at áðrenn Gjaldsstovan eftirhelt pengunum, eftirkannaði hon ikki hjá kommununi, um hon góðtók kravið.

– Men hesa mannagongd eiga vit helst at broyta, so at vit í nógv størri mun enn nú eftirkannað krøvini hjá kommununum, vit fáa. Men fyri tað er ikki sagt, at vit ikki mótrokna í kommunuskattinum fyri eina rokning, um kravið annars er rætt og kommunan eigur at gjalda, sigur Leif Abrahamsen.

# Leggja alt landið undir sjóneyku

**Ferðaráð Føroya er farið eitt umfatandi tiltak, har tey ferðast úr enda í annan í Føroyum at kanna eftir, hvussu støðan er og, hvat kann gerast, fyri at menna ferðavinnuna**

FERÐAVINNA
*Áki Bertholdsen*

– Nú skal alt landið leggjast undir sjóneykuna.

Tað er Ferðaráð Føroya, sum leggur alt landið undir sjóneyku.

Ferðaráðið er nú farið undir eitt umfatandi tiltak, har tey ferðast úr einum enda í landinum í annan at kanna viðurskiftini.

Tað er sjálvsagt ferðavinnan í teimum ymsu økinum, sum verður kannað.

Fyrsti støðgur í hesi landsumfatandi rundferðini hjá Ferðaráðnum varð Suðuroyggin og síðani verður farið í øll hini fimm ferðavinnuøkini í landinum, Sandoy, Vágar, Eysturoy o.sfr.

Á fundinum í Suðuroynni, sum var á Hotellinum í Øravík hóskvøldið, hitti Ferðaráðið umboð fyri kommunurnar í oynni, umframt fólk, sum vara av ferðavinnuni í Suðuroynni, eitt nú økisferðavinnunevndina.

– Endamálið við hesi rundferðini er at gera støðuna upp í hvørjum øki sær. Endamálið er at kanna, hvussu støðan er í hvørjum einstøkum øki. Samstundis er ætlanin at kanna eftir, hvørjir møguleikar eru at menna ferðavinnuna í hvørjum einstøkum øki, hvar ábøtur eru tiltrongdar í hvørjum øki fyri at kunna menna ferðavinnuna, hvørjir fyrimunir og vansar eru o.sfr. sigur Heri Niclasen, stjóri í Ferðaráðnum.

Hann sigur, at eftir at hava vitjað í økinum, fer Ferðaráðið at kanna tilfarið og upplýsingarnar, tey hava fingið og síðani er ætlanin at gera ítøkilig uppskot til, hvussu ferðavinnan í hvørjum einstøkum øki kann mennast.

Men hann leggur dent á, at talan skulu vera um uppskot, sum eru realistisk og sum tað ber til at seta í verk.

Endamálið við hesari landsumfatandi rundferðini hjá Ferðaráðnum er eisini at vita, um kommunurnar taka undir við at brúka eitt sindur av pengum til at menna ferðavinnuna.

– Eg má siga, at vit fingu rættiliga góða undirtøku í Suðuroynni, sigur stjórin í Ferðaráðnum.

## Raðfest fremst

Ferðaráð Føroyar hevur ymsar uppgávur, men Heri Niclasen sigur, at framyvir verður tað, at menna og ráðgeva ferðavinnuna, sum verður raðfest fremst.

– At menna ferðavinnuna kann vera so mangt. Tað kann vera at bøta um umstøðurnar hjá ferðavinnuni, tað kann vera at menna nýggj ferðavinnutilboð, at hækka kunningar- og tænastustøðið ella at menna góðskustýringsskipanir, sum skulu tryggja ferðafólkunum dygd og upplivilsir.

Hann sigur, at kjarnin í innanlands menningini hjá Ferðaráðnum er, eftir førimuni, at vísa vinnu, kommunum og økisferðavinnufeløgunum á gongdar leiðir í royndunum at menna ferðavinnuna og at ráðgeva um, hvussu hetta kann fremjast í verki og at virka fyri, at vinnan hevur góðar karmar at virka undir.

– Tí er tað eisini neyðugt at Ferðaráðið og økisferðavinnufeløgini kring landið samstarva um at marknaðarføra tey ymsu økini, so hesi í størri mun fáa møguleika at bjóða seg fram í ferðavinnuhøpi og fáa ágóða og royndir í ferðavinnu, akkurát á sama hátt sum Ferðaráðið hevur eitt gott samstarv við vinnuna um marknaðarføringina uttanlands, sigur stjórin í ferðaráðnum.



*Fólk, sum vara av ferðavinnuna í Suðuroy lurta við áhuga eftir, hvat Ferðaráðið hevur at bera fram. Fremst á myndini eru tey Birita Nolsøe av Ferðaráðnum, Poula Strøm, Kristin Magnussen og Jonny Dimon av Kunningarstovuni á Tvøroyri, Ebba Julsgart í nevndini í kunningarstovuni, Petry Joensen, skrivari í Vágs Kommunu og Óli Debes, skrivari í Tvøroyrar Kommunu. Annars vóru kommunalpolitikarar úr allari oynni við á fundinum*





*Hetta vóru vápnini, sum maðurin hevði í hondini, tá hann kom inn í tingsalin*
Mynd: Jens Kr. Vang



*Eingin ivi er um, at hetta er eitt vandamikið vápn, um tað verður nýtt til tað skeiva endamálið*
Mynd: Jens Kr. Vang

## Kirkjukonsertir

Í komandi viku verða konsertir í kirkjunum í Oyndarfirði, Vági, Tvøroyri og í Havn. Tað verða tey fýra Leila Nielsen á blokkfloytu, Jens Smith á violin, Árni Hansen á cambalo og Jens Christian Guttesen á cello, sum fara at spæla.

Tað eru Konsertfelagið og Norðurlandahúsið, sum skipa fyri kirkjukonsertunum.

# Vápnaður maður legði eftir tingmanni

**Hóskvøldið var ein vápnaður maður komin inn í Løgtingið, sum heldur til í útvarpinum, og hann legði eftir tingmanni, sum kom niður av røðarapallinum. Karsten Hansen var skjótur og steðgaði manninum, sum hevur gjørt seg inn á útvarpið seinastu vikurnar við at tøma ruskíløt uttanfyri og inni í gongini**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*
*Jústinus Leivsson*
*Eidesgaard*

Hóskvøldið klokkan seks varð tingarbeiðið avbrotið. Orsøkin var, at ein vápnaður maður var komin inn í tingsalin og fór eftir einum tingmanni, sum kom niður av røðarapallinum.

Maðurin hevði vápn í hondini. Tað vóru tveir kalvapilkar, sum vóru eini 17 sentimetrar til longdar. Í endanum vórðu fýra húkar sveisaðir fastir í pilkin, so tað var eitt vandamikið vápn, um tað varð nýtt til tað skeiva endamálið.

Karsten Hansen hevur greitt frá, at hann sá mannin koma inn í útvarpshøllina, har tingmanningin heldur til. Hann setti seg nær hjá honum, tí hann sá vápnið, hann hevði í hondini, og landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevði varhugan av, at maðurin hevði ætlanir um at leypa á.

Í tí ein tingmaður var liðugur við sína røðu, reistist vápnaði maðurin og helt leiðina yvir ímóti tingmanninum. Karsten, ið er løgreglumaður, fekk steðgað manninum, og løgreglan varð boðsend.

## Leyslatin aftur

Maðurin varð handtikin og tikin oman støðina til avhoyringar. Maðurin varð fyrst afturhildin, og fríggjamorgunin varð hann avhoyrdur. Eftir avhoyringina varð hann leyslatin aftur.

Ein lækni varð tilkallaður beinanvegin, tá løgreglan hevði handtikið mannin, og hann hevur eftir øllum at døma kannað sinnisstøðuna hjá manninum.

Við tað at maðurin er handtikin, verður hann eisini skuldsettur. Løgreglan ger tær neyðugu kanningarnar fyri at lýsa málið, og síðani skal fútin taka støðu til, um ákæra skal reisast.

Í revsilógini er Føroya Løgting beinleiðis nevnt. Har stendur, at tann, sum við larmi ella óskili órógvar almennar fundir hjá fólkatinginum ella Føroya løgtingi, verður revsaður. Tað er eftir hesi greinini í revsilógini, at maðurin verður skuldsettur av løgregluni.

Tað verður tó fútin, ið tekur støðu til, um ákæra skal reisast móti manninum, ella um tað skal greiðast øðrvísi.

Maðurin er gamal kenningur hjá løgregluni, og hann hevur gjørt seg inn á útvarpið seinastu vikurnar, meðan tingmanningin hevur havt fundir har uppi. Hetta hevur verið við at tøma ruskíløt við allari hugsandi óhumsku uttanfyri úthurðina í útvarpinum. Eisini er innihaldið av onkrum ruskílati tømt inni í gongini.

Hesar hendingarnar eru tó ikki allar fráboðaðar løgregluni, frætta við av støðini, men dagin fyri hendingina í útvarpshøllini hevði hann aftur verið og tømt ruskílatið uttanfyri hurðina.

### Forbrydelser mod den offentlige orden og fred.

§ 137. Den, som søger at forhindre afholdelsen af lovlig offentlig sammenkomst, straffes med bøde eller hæfte eller under skærpende omstændigheder, særlig når handlingen har været forbundet med voldsom eller truende adfærd, med fængsel indtil 2 år.

Stk. 2.9) På samme måde straffes den, der ved larm eller uorden forstyrrer offentlig samling af folketinget, Færøernes lagting, kommunale eller andre offentlige råd, gudstjeneste eller anden offentlig kirkelig handling, eller som på usømmelig måde forstyrrer ligfærd.



*Hetta hevur verið gerandiskostur í útvarpinum seinastu vikurnar. Ruskíløt við óhumsku tømd uttanfyri útvarpið*
Mynd: Jens Kr. Vang